# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Sjóvinna

Sjóvinna hevur nógv ár á baki í Føroyum, og er ein av vinnunum, har vit útflyta mest arbeiðsmegi. Føroyingar manna brúgvar og maskinrúm í útlendskum handilsflotum, serliga tí danska. Ein kundi spurt, hví hesir føroyingar ikki manna tann føroyska handilsflotan. Svarið er einfalt. Har er so at siga eingin føroyskur handilsfloti. Har vit fyrr plagdu at hava nógv føroysk reiðarí, har er nú bara okkurt einstakt eftir.

Vit fingu eina FAS skipan í 90'unum, men ikki kann sigast, at hon hevur havt stórvegis ávirkan á gongdina seinastu árini. Hon hevur í hvussu er ikki verið tað, sum tey, ið talaðu fyri FAS skipanini, søgdu, at hon fór at vera.

Altjóða skipaskrásetingar í grannalondum eru lagaligari enn okkara, men shipping og skipafloti hava lutfaltsvíst nógv minni at siga í teimum londunum enn í Føroyum. Føroyingar, sum sigla við danska handilsflotanum, fáa sína inntøku skattafría, eins og danir. Hetta merkir, at einki kemur inn í inntøkuskatti frá teimum føroyingum, ið sigla við danska handilsflotanum, men einki er at ivast í, at hetta í Føroyum hevur stóran týdning annars í óbeinleiðis skattum og ikki minst, í varðveitslu av fólkatalinum. Shippingvinnan er global, og har hevur tað ikki nógv at týða, hvar arbeiðsmegin býr.

Røddir hava verið frammi um at gera føroysku FAS skipanina betri, so at vit kunnu fáa ein nógv størri flota, enn vit hava í dag. Trupulleikin er bara, at vit kunnu ikki bara kopiera eina aðra skipan, og hví skuldi nakar flaggað skip inn í føroyska flotan, um skipanin bert er líka góð sum t.d. DIS? Argumentið um, at bara man ger skipanina betri, so kemur alt av sær sjálvum, heldur so ikki, tí tað vóru akkurát somu tónar, sum vóru at hoyra, tá FAS av fyrstani tíð kom, men einki sæst til nakra stórvegis ávirkan.

Skal ein nýggj FAS skipan gerast, so má tað fyriuttan innflagging av útlendskum skipum, eisini vera útfrá einum hugburði, har man sær føroyska shippingvinnu klára seg í kapping við aðrar og ekspandera, og ikki at man akkurát klárar at hóra undan við, at reiðaríini sleppa hasi prosentini bíligari í hýru. Endamálið má ikki vera, at man klárar seg líka gott, men betur. Menning av shippingvinnuni krevur støðufesti og pálitiligheit og ikki minst eina ávísa endurnýgjan og ein progressivitet innan farmaflutning, sum ikki altíð hevur verið tað, sum hevur eyðkent privatu farmavinnuna í Føroyum. Eingin automatikkur er í, at føroyska farmavinnan fer at mennast automatiskt, um man bara ger eitt nýtt FAS. So mikið hevur søgan lært okkum, og tí er gott, at man nú hevur tikið initiativ til eina ráðstevnu um shipping, so at vinnan sum heild verður diskuterað, heldur enn bara ein partur í senn. Gott er at fáa eitt orðaskifti um, hvussu vit við nýggjum skipanum og dygararbeiði kunnu gerast kappingarførir við onnur lond og harvið kunnu menna flotan, eisini í offshorevinnuni og kunnu manna hann við okkara egnu fólkum.

**Sosialurin**

## Bábilonsk fløkja

**HERI MOHR**



Í landsstýrinum, sum í roynd og veru legði frá sær seint í fjør, framdi landsstýrismaðurin við mentamálum og Føroya løgting yvirtøku av fólkakirkjuni í stóran mun uttan lógarstøðið, sum fólkakirkjan stóð á. Sum øllum kunnugt var nevndi landsstýrismaður limur í einari trúðarsamkomu, sum einki hevur við fólkakirkjuna at gera. Einki skeivt ella ilt um tað Men at okkara fyrsti "kirkjuministari" skuldi finnast uttan fyri fólkakirkjuni, fall óivað mongum føroyingi fyri bróstið.

Í Dimmalætting 28. í h. mð. (nr. 42) fáa vit at vita, at landsstýrismaðurin í kirkjumálum í okkara (spildur)nýggja landsstýri er hvørki eitt ella annað, t. v.s. ikki limur í fólkakirkjuni ella í nakrari samkomu. Heldur ikki nakað skeivt ella ilt um tað.

Har sum ein skriðan er lopin, er onnur væntandi, plagar at verða tikið til. Viðvíkjandi fólkakirkjuni, so eru vit óttafull: onnur skriðan er longu lopin, og valla slepst undan bæði triðju og fjórðu skriðuni, áðrenn okkara fedranna kirkja (les: føroyskur kulturur í andaligari merking) verður so kryplað, at hon gerst okkum fremmand. Í stóran mun takkað veri nýggju, politisku fávitskuni.

Í samgonguskjalinum 4. februar er *Mentan* sundurliðað í 24 ymiskum teigum, har fólkaskúlin sjálvandi er tikin við í landsstýrisins 4-ára ætlan, men fólkakirkjan, sum de facto er yvirtikin við so at siga ongum lógum, er als ikki nevnd. Man tað vera orsakað av gloymsku, ella er tað ómentað atferð: - nú er hon yvirtikin, so er nóg mikið við henni?

Slíkt kann vekja órógvandi hugsan.

Í farnu viku skrivaði Sjúrður Skaale, p.t. fólkatingslimur búsitandi í Danmark (?), í bløðunum um hóttandi Berufsverbot í umsitingini av tí føroysku fókakirkjuni. Hann veit sjálvandi, at Berufsverbot, sum varð handhevjað við lóg í Týsklandi fyri tretivu árum síðani og vanligt vit og skil í okkara fólkakirkju, einki hava við hvørt annað at gera.

Fólk í almennum og privatum arbeiði verða vanliga sett í starv eftir meting um, hvørt viðkomandi er skikkaður til starvið.

Men tað, sum fólkatingslimurin skrivar um, er á so lágum støði, at kirkjufólk yvirhøvur munnu stúra fyri avleiðingunum. Hetta hevur ikki samljóð við dýrgripirnar frá eitt nú Jákupi Dahl, Mikkjali á Ryggi, Jóannesi Patursson, Fríðriki Petersen, Símuni av Skarði, Gudmundi Bruun ella *Kirkjuni á tanga* hjá Mariu Skylv Hansen. Stutt sagt: Kirkjufólkið er ørkymlað av tí óføroysku skriving, sum nú fer fram um *fedranna kirkju*.

Klandrið og skrivingin, sum tók seg upp, í somu løtu løgtingið hevði samtykt, at fólkakirkjan skuldi koma á føroyskar hendur, er ósømiligt.

Hetta er skomm, mannminkandi, ómentað.

……. tjóðskaparliga sjálvfrelstur flytifuglur við tungum flogi og hásari rødd á niðastu rók, verður skjótt einsamalt ljóð í avoyddum bjørgum……

## - Nýggj heimasíða og hægri ættleiðingarstuðul

Ættleiðingarfelagið hevur fingið nýggja heimasíðu og fegnast felagið um, at tey fyrstu tíðindini felagið kann kunngera eru, at Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður fer at leggja fram uppskot um at hækka tann fíggjarliga stuðulin til ættleiðingarforeldur.

Ættleiðingarfelagið hevur leingi víst á, at fíggjarligi stuðulin til ættleiðing ikki er hóskandi í mun til útreiðslurnar í sambandi við ættleiðing.

Síðani september í fjør hevur felagið samskifta við landsstýrismannin um málið, og fríggjadagin 29. februar fekk felagið skrivliga tilsøgn frá landsstýrismanninum um, at hann fer at leggja fram uppskot á Ólavsøku um at hækka stuðulin. Enn vita vit ikki hvussu nógv stuðulin hækkar, men felagið vónar og væntar, at tað verður ein munandi hækkan.

**www.aettleiding.fo**

Nýggja heimasíðan hjá Ættleiðingarfelagnum er uppbygd sum ein blogga og er møguligt hjá vitjandi at gera viðmerkingar og kjakast á síðuni. Vitja www.aettleiding.fo

**Ættleiðingarfelagið**

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Mortensen niels@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.